# Reglugerð fyri hald av flogfenaði í Skopunar kommunu

Við heimild í §§ 26 og 32 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur, við seinni broytingum, verður hendan reglugerð sett í gildi.

## Øki og lýsingar

§ 1. Reglugerðin fevnir um uttandura hald av flogfenaði í Skopunar kommunu.

Stk. 2. Reglugerðin fevnir tó ikki um vinnuligt virksemi, ið hevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisvernd.

Stk. 3. Flogfenaður er høsn, gæs, dunnur, kalkunir, dúgvur og annar fuglur.

## Krøv til flogfenaðhald

§ 2. Øll, ið fara undir at halda flogfenað, skulu gera tað í samsvari við hesa reglugerð.

Stk. 2. Flogfenaðhald, ið longu eru, áðrenn reglugerðin kemur í gildi, kann halda fram sum er, men koma tó undir reglurnar í §§ 3-5.

## Krøv til búr, garðar, girðingar, hús og tílíkt

§ 3. Flogfenaður skal verða inngirdur.

Stk. 2. Búr, hús og tílíkt bygningskent tilhald hjá flogfenaði skal vera í minsta lagi 2,5 m frá marki til granna.

Stk. 3. Girðing skal antin vera púra tøtt, ella vera í minsta lagi 0,5 m frá marki til granna, tá talan er um hegn, rimagarð ella tílíkt.

Stk. 4. Girðingin skal gerast forsvarliga, eisini so, at annar fuglur ikki fær flogið inn og um neyðugt, skal net spennast yvir.

Stk. 5. Búr og hús skulu vera lyft 0,35 m upp frá jørðildinum fyri at tryggja móti rottu. Tó ikki gásarhús, ið kunnu vera grivin niður í svørðin.

Stk. 6. Hanar mugu ikki vera uttandura millum kl. 21 á kvøldi og kl. 7 á morgni.

## Fóður og tílíkt

§ 4. Fóður skal goymast í rottutryggum íløtum.

Stk. 2. Gevast má ongantíð meiri fóður enn tað, sum verður etið eftir í mesta lagi einum tíma. Møguligar fóðurrestir skulu takast burtur í seinasta lagi ein tíma áðrenn sólin setur, tó í seinasta lagi kl. 20.

Stk. 3. Búr, hús o.t. skulu regluliga sópast og haldast rein. Girðingar skula haldast í góðum standi.

## Boð og forboð

§ 5. Um hald av flogfenaði elvir til ampa so sum lukt, gang, nógva flugu, rottu ella annað, kann kommunan geva eigaranum boð um, hvussu viðurskiftini skulu fáast í rættlag. Verða boðini ikki fylgd, kann kommunan seta forboð fyri haldinum. Hetta sambært § 23, stk. 2 í kunngerðini um umhvørvisreglur, við seinni broytingum.

## Undantaksloyvi

§ 6. Í serligum førum kann Skopunar kommuna eftir umsókn, geva smærri frávik frá ásetingunum í

§ 3.

## Klagur

§ 7. Klagur um brot á hesa reglugerð skulu sendast til Skopunar kommunu.

## Kærumál

§ 8. Boð ella forboð hjá Skopunar Kommunu eftir hesi reglugerð kunnu innan 4 vikur kærast til Umhvørvisstovuna. Kæra skal sendast til kommununa, sum sendur hana til Umhvørvisstovuna saman við viðkomandi tilfari í málinum.

Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni í kærumálum kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.

## Gildisreglur

§ 9. Henda reglugerð, sum er samtykt á kommunustýrisfundi tann 30. Juni 2025 og er góðkend av Umhvørvisstovuni tann 1. Decembur 2025, kemur í gildi 1. Jannuar 2026.